# ÚTBJÓÐING AT LISTPRÝÐA NÝGGJU FIMLEIKAHØLLINA FIMI Í GUNDADALI

**Listabólkurin hjá Tórshavnar kommunu bjóðar við hesum listafólkum at lata uppskot til uttandura listaverk til nýggju fimleikahøllina FIMI í Gundadali í Havn.**

Í hesum sambandi skal Listabólkurin gera vart við, at talan verður um listaverk, sum stendur úti, har fóllk ferðast framvið. Dentur verður lagdur á, at listaverkið verður gjørt úr tilfari, sum hóskar seg til føroyska veðurlagið.

### ÚTBJÓÐING

Leisturin fyri útbjóðingina verður soleiðis:

- Listaverkið er eitt uttandura listaverk (standmynd) og skal standa á ávísum plássi. Sí tekning á www.torshavn.fo
- Listafólk lata uppskot (modell) inn við frágreiðing um listaverkið. Í uppskotinum skal greiðast frá hesum:
  1. støddin á listaverkinum
  2. kostnaður íroknað uppseting
  3. avhendingardagur
  4. neyvt greina tilfarið, sum verður nýtt til listaverkið
  5. geva trygd fyri, at tilfarið, ið nýtt verður til listaverkið, er haldgott og tolir føroyska veðurlagið
  6. at listaverkið og festini eru so haldgóð, at tað klárar í minsta lagi eina vindferð sum er 60 sek/m.
- Listabólkurin skilar sær rætt til frítt at velja millum uppskotini ella einki at taka.
- Tá Listabólkurin hevur avgjørt, hvør fær uppgávuna, verður sáttmáli gjørdur við viðkomandi listafólk, har m.a. treytir fyri avhending, uppseting, kostnað og aðrar treytir verða ásettar.
- Tá ið avgjørt er, hvør fær uppgávuna, skilar Listabólkurin sær rætt til at vísa fram alment innkomnu uppskotini í 14 dagar.
- Uppskotini skulu vera Listabólkinum í hendi í seinasta lagi mánadagin 9. august 2010. Um uppskot koma inn eftir ásettu freist, verður sæð burtur frá teimum.

### MEIRI FÆST AT VITA

um útbjóðingina við at venda sær til Jákup Simonsen, mentamálaleiðara, telefon 302010.

www.torshavn.fo

TÓRSHAVNAR KOMMUNA



LÍV søkir eftir

# samskipara til Pf. Lutaíbúðarvirkið

Til nýstovnaða luta- og leiguíbúðarfelag okkara søkja vit eftir framsøknum samskipara at seta skjótast gjørligt.

**Um starvið**
Pf. Lutaíbúðarvirkið er dótturfelag hjá LÍV og hevur sum endamál at byggja og reka luta- og leiguíbúðir í Føroyum. Sum samskipari fært tú ábyrgdina av uppstartinum av felagnum, har tú í samskifti og samstarvi við almennar myndugleikar fert at geva felagnum best hugsandi byrjan.

Starvið er tíðaravmarkað til 31. des. 2011.

**Um teg**
Vit vænta, at tú hevur viðkomandi útbúgving og royndir. Umsøkjarar, sum hava arbeitt við líknandi verkætlanum áður, hava fyrimun. Tú hevur harumframt eitt sjálvstøðugt arbeiðslag, ert íðin og dugir væl at samstarva. Tú hevur eisini góðar førleikar at orða teg í skrift og talu.

**Umsóknir og umsóknarfreist**
Umsóknir við avritum av prógvum, CV og øðrum skjølum skulu sendast til:

LÍV
Starvsfólkadeildin
Kopargøta 1
Postsmoga 206
110 Tórshavn

Umsóknir skulu vera okkum í hendi í seinasta lagi mikudagin 26. mai.

**Meira at vita?**
Hevur tú okkurt at spyrja um í sambandi við starvið, ert tú vælkomin at seta teg í samband við Atla Rasmussen á telefon 231 112 ella á atli@liv.fo.

LÍV er størsti veitari av lívs- og eftirlønartryggingum til fakfeløg og virkir.

Kopargøta 1
P.O. Box 206
FO-110 Tórshavn
Faroe Islands
Tlf. +298 31 11 11
Fax +298 35 11 10
www.liv.fo

SENDISTOVAN